# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Jóhannus fekk eisini bonus frá bankanum

**Sambært roknskapinum hjá Føroya Banka fekk Jóhannus Egholm Hansen 274.000 krónur fyri at sita í nevndini í 78 dagar í fjør. Hetta er ein feilur, sigur fyrrverandi nevndarformaðurin. Sambært honum var størsti parturin av samsýninginini eitt bonus fyri hansara arbeiði í samband við at bankin varð skrásettur á virðisbrævamarknaðinum**



*- Feilur er í roknskapinum. Eg fekk 200.000 krónur í bonus og 74.000 krónur í nevndarsamsýning frá Føroya Banka, sigur Jóhannes Egholm Hansen*

FÍGGJARVINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Í 2005 fingu nevndarlimirnir tilsamans 692.000 krónur í samsýning fyri sítt nevndararbeiði í almenna bankanum. í fjør bleiv nevndarsamsýningin hækkað til 2,1 milliónir krónur, umframt at nevndin gav sær sjálvum 1,4 milliòn í bonus.

Ein av nevndarlimunum sat bara í nevndini styttri enn tríggjar mánaðir - kortini fekk hann 274.000 krónur í samsýning. Jóhannus Egholm Hansen sat í nevndini í Føroya Banka til og við 19. mars í fjør, hetta tíðarskeiðið var hann næstformaður í nevndini. Fyri hesar 78 dagarnar fekk hann 274.000 krónur í nevndarsamsýning. Sambært roknskapinum hjá Føroya Banka fekk Jóhannes Egholm Hansen einans vanliga nevndarsamsýning, ikki bonus.

Tá Sosialurin tosaði við Jóhannus Egholm Hansen í gjár, var hann fáorðaður um samsýningina.

- Eg veit ikki, hvaðan tú hevur tølini. Eg havi ikki sæð tølini, og ynski tí ikki at gera viðmerkingar til tey, segði Jóhannes Egholm Hansen við Sosialin í gjár.

Spurdur, hvørt hann ikki hevur móttikið pengarnar fyri langari tíð síðani og tískil átti at vitað, hvat hann hevur fingið pengarnar fyri, segði Jóhannes Egholm Hansen seg ikki ána, hvussu nógv hann hevði fingið.

Men nú hevur Jóhannus Egholm Hansen havt stundir at seta seg inn í viðurskiftini. Við Rás2 í gjárkvøldið segði Jóhannes Egholm Hansen, at talan er um eitt mistak í roknskapinum, hóast upphæddin er røtt. Hann segði seg hava fingið 74.000 krónur í nevndarsamsýning og endurrindan fyri ferðaútreiðslur. Restina, tvs. 200.000 krónur, fekk hann í bonus fyri sítt arbeiði at fyrireika bankan til at verða skrásettur á virðisbrævamarknaðinum.

- Meginparturin av hesum arbeiði var liðugt í februar 2007, og tí haldi eg tað vera rímiligt, at eg eisini fái bonusið, segði Jóhannes Egholm Hansen í stuttari viðmerking til Rás2 í gjárkvøldið. Hann ynskti annars ikki at gera samrøðu við Rás2.




ER DU HÅNDVÆRKER - OG HAR DU LYST TIL EN NY KARRIERE

**Væksten for Würth på Færøerne fortsætter, og derfor søger vi nu yderligere 2 sælgere til henholdsvis Byggeriet og Metal/Autobranchen.**

**Bygsælger**
Som sælger I byggebranchen skal du besøge tømrere, snedkere, murere, malere, entreprenører og andre træ- og byggeorienterede virksomheder.

**Metal/Autosælger**
Som sælger I Metal- /Autobranchen skal du besøge:
**Metal (70 %):** maskinfabrikker, smedevirksomheder, VVS firmaer, kølemontører, rørlæggere, blikkenslagere, ventilationsfirmaer, metalindustrier, interne værksteder, el-installatører mm.
**Auto (30%):** personbil-/lastvognsværksteder, karrosseriværksteder og autolakerere mm.

**For begge stillinger gælder det at:**
- Du er energisk, opsøgende og resultatorienteret
- Du er tillidsvækkende og kontaktskabende, hvilket gør dig i stand til at udvikle varige kunderelationer
- Det er en fordel, hvis du har en håndværkerbaggrund eller andet kendskab til branchen. Dette er dog ikke et krav; frem for alt skal du have lyst til at beskæftige dig med opsøgende salg.
- Vi forventer ikke du har en baggrund som sælger, da vi giver dig en grundig oplæring i salg.
- Du taler færøsk og dansk

**Hvad tilbyder vi:**
- En afvekslende og selvstændig hverdag i en professionel og vækstorienteret salgsorganisation inden for befæstelse, værktøj, kemiske produkter, personlige værnemidler, lagerkoncepter mv. til professionelle brugere i auto-, metal-, el- og byggebranchen.
- Grundig introduktion og oplæring
- En løbende teoretisk og praktisk uddannelse, hvor du hele tiden udvikler dig som sælger
- Fast løn med provisionsordning, bonusordning og pensionsordning.

Du er meget velkommen til at ringe til Würth Sælger Claus Christensen på telefon 225017 hvis du vil vide mere om jobbene.

Samtalerne vil foregå på dansk, da dit dansk sikkert er bedre end vores færøske!

Vi afholder samtalerne mandag den 3. og tirsdag den 4. marts 2008 i Tòrshavn.

**Lyder det som dit nye job?**
- så klik ind på vores hjemmeside: www.wuerth.dk under "Job hos Würth", hvorfra du kan sende os din ansøgning elektronisk. Vi glæder os til at høre fra dig!

**Ansøgningsfrist: 26. februar 2008**
**www.wuerth.dk**

12.02.2008- Byg og metal færøerne

*Würth Danmark A/S er Danmarks største salgsorganisation og er markedsførende inden for salg af befæstelsesmaterialer og værktøj. Vi er flere end 500 dedikerede medarbejdere i Danmark og flere end 60.000 på verdensplan.*



RØRSMIÐUR

**Vit sóknast eftir einum rørsmiði at byrja skjótast gjørligt**

**Tín førleiki**
Vit vóna, at tú ert dugnaligur, íðin, nærlagdur og sjálvstøðugur. Harafturat skalt tú skilja týdningin av góðum handverki.

**Afturfyri bjóða vit**
Tú fært góðar arbeiðsumstøður og eitt menningandi fakligt arbeiðsumhvørvið.
Stutt sagt – eitt starv í einari spennandi og fjøltáttari fyritøku í støðugari menning.

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Arthur á tel. 21 96 00 ella 31 20 00.

**Maria Poulsen pf**
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn

Maria Poulsen